Eimskip fara ikki at kappast við Strandferðsluna

Strandferðslan er ein av okkara størstu tænastuveitarum, skriva Eimskip í hesi viðmerking til grein, sum stóð í Sosialinum fríggjadagin:

Vísandi til grein í Sosialinum 12.05.00, har borið verður fram, at Eimskip kann hótta Strandferðsluna við at fara undir egna farmaleið millum oyggjarnar við salti, tá saltsølan hjá Eimskip letur upp í Runavík í september, er tað umráðandi at leggja til merkis at talan ongantið hevur verið um kapping millum P/F Eimskip í Føroyum og Strandferðsluna, men heldur hinvegin um gott samstarv. Hetta samstarv heldur vónandi fram.

Gongulagskapping hjá Føroyskum Íslandsrossafelag

Vikuskiftið 20. og 21 mei verður skipað fyri gongulagskapping á vølli felagsins á Kráarheyggi. Tað hevur verið ógvuliga stór framgongd við luttakaratalinum fyri hvørja kapping í ár, síðstu kapping vóru nærum 35 ross við og var tað tað mesta nakrantíð.

Til fyrstu kapping í ár byrjaðu vit uppá nakað nýtt, tað var at hava kappríðing í trav og skeið á vølli Føroya Ríðingafelags í Havnadali og var tað sera góð undirtøka í hesum og eydnaðist hetta serstakliga væl, henda kapping byrja kl. 10.00 leygarmogunin.

Kl. 14.00 sama dag verður kappast í fjórgongd, fimmgongd og tølt, hetta er tað innleiðandi umfarið og verður hildið áfram við finalu umfarinum sunnudagin kl. 14.00. Seinasta freist at tekna seg til kappingina er hóskvøldið 18.05. áðrenn kl. 22.00 á tlf. 315078 Elin Poulsen og tlf. 217688 David Nordendal.

Nakrir tankar, og fátæk orð um ein góðan vin, sum farin er

Magnus á Dalbø
Miðvágur

Ogur koma av og á út fyri at møta menniskjum, sum tú við tað sama kemur at halda av og kennist tað, sum ein hevur kent tey í mong ár, sjálvt um bráðið er stutt.

Eitt av hesum menniskjum var Magnus, so skjótt vit komu á tal, blivu vit væl og kundu tosað um øll lívsins viðurskifti. Hesin róligi og dámligi maður, sum kom suður at búgva fyri nøkrum árum síðan, fall so væl til fímillum okkum á staðnum.

Oftani komst tú á kajina til eitt prát og so var eisini í aug. í fjør, síðstu ferð vit tosaðu saman, og lovaði eg at koma inn a gólvið, um leiðin komst yvir Miðvág, men so bleiv tað ei.

Eg var staddur á sjónum, tá eg frætti boðini, at fjørðurin var rógvin, tað er sum ein stirnar, tá vinir verða ryktir burt, sjálvt um ogur vita, at hettar er alt farandi.

Ogur høvdu eisini manga góða løtu hjá Frelsunarherinum her á staðnum og felags hevði ogur eisini vónina uppá tað sum gott er, og sum koma skal.

Hvussu stóran týdning konan, børnini og abbabørnini høvdu, kom altið fram tá vit komu á tal.

Til tykkum, hansara kæru, má Gud geva tykkum linna og styrk í sorg tykkara.

Hvíl í friði frægi vinur.

Martin J. Strøm

Viðmerking:

Ov fá taka varaløgmann í álvara, tíverri

Løgin viðmerking var at lesa í Sosialinum 12.maj, har varaløgmaður enn eina ferð østi seg upp um, at øll ikki tóku undir við hansara tjóðveldisfullveldítvassi. Løgin (ikki bert yvirskriftin men innihaldið), tí nýggir upplýsingar, tankar ella nýggj sjónarmið vóru eingi. Løgin, tí hann skeldar andstøðuna út, tí hon hevur andstøðusjónarmið og ikki fantasifull fullveldissjónarmið. Løgin, tí hann letst ikki at fata veruligu kreppustøðuna.

Ja, yvirskriftina skilti eg ikki rættiliga. Tað var nakað um, at tað sum átti at venda upp, tað hekk niður. Og tad sum plagdi at venda niður, tad stóð nú upp. Og so siga fólk at fullveldið hevur skyldina í tí. Okkurt ókent ella kent fenomen man níva mannin.

Ein óvitandi varaløgmaður

Varaløgmaðurin sigur seg ikki skilja orðaskifti, sum fer fram í løtuni. Nei, kanska hevði nakað meir av politiskari erfaring styrkt hansara dømikraft. Nú sær hann bert alt sum *"Svartar myndir"* og *"útspilling", "ómegdatos"* og *"ræðumyndir"*. Hesi orð, sum hann brúkar í tíð og úrtíð um sjónarmið, sum honum ikki dámar ella ikki skilir, eru longu púra niðurslitin. Jú eitt nýtt uppfinnilsi var hesuferð *"Ábyrgdarloysi sum politisk hugsjón"*, var ein yvirskrift hjá honum. Hetta er hansara felagsnevnari, sum umfatar øll, sum ikki taka undir við honum og hansara sjónarmiðum. Hvat billar hann sær inn?

Varaløgmaður sigur seg ikki vita um nakað annað fólk, sum *"hevur upplivað eina slíka útspilling sínamillum"*. Ja, men so veit hann alt ov lítið. Í Føroyum gongur alt enn rættiliga civiliserað fyri seg. Øll onnur munnu vita, at fólkasløg londum aðrastaðir ikki bert hata hvønn annan, men eisini drepa og fara í borgarakríggj móti hvørjum øðrum. Tak Bosnia, Kosova, Norðurírland, Miðeystur, Indonesia, Chile ella 100 onnur pláss í verðini, har fólk ikki kunnu liva saman. Hví eru milliónir av flóttafólki í verðini?

Soleiðis er ikki í Føroyum, -enn. Men her so ein varaløgmaður og øsir seg upp, bert tí hann fær mótstøðu á politiska leikvøllinum.

Forboði at tosa við donsku pressuna?

Og so vindur hann seg upp um, at onkur persónur hevur svarað spurningum í donskum bløðum. *"Hugsi neyvan, at danskir andstøðupolitikarar høvdu farið í bætsk bløð at spilla stjórnina út"* sigur vara. Enn einaferð skilir hann ikki, at hann brúkar eina óbrúkiliga mynd ella líknilsi. Føroyar og Danmark eru enn partar av sama demokratiska ríki. Landstýrið hevur biðið Ríkisstjórnina um samráðingar um at Føroyar fáa fullveldi. Tí er tað kanska relevant at føroyskir politikarar, bæði í samgongu og í andstøðu, úttala sig til donsku pressuna (og danskir politikkarar til føroysku pressuna). Myndin, sum varaløgmaður brúkar, er skeiv, tí Danmark er ikki í nøkrum ríkisfelagskapi við Bretland. Danmark samráðist ikki um at loysa frá Bretlandi. So hatta svassið kann bert teljast sum sjálvmál.

Men hvør er tað, sum skrivar bók um fullveldismálið. Á donskum máli, á donskum forlag, útgivin í Danmark? Hvør er tað sum letur seg í interviewa í donskum sjónvarpi og donskum blødum. Er tað ikki ein vissur varaløgmaður sjálvur, sum fer til "bretsku" pressuna??? Heldur hann seg hava einarætt til at úttala seg, so er okkurt spinnandi gali.

Alt ilt kemur úr Danmark

Landsstýrismaðurin hevur so ein langan lista, sum skal vísa hvussu illa stendur til í Danmark: Fólk á ellisheimum eru misrøkt, einslig fólk liggja deyð í langa tíð í heiminum áðrenn tey vera funnin, bíðilistar eru til hospitalsviðger av ávísum sjúkum osfr. et cetera. Konklusiónin hjá honum er meir enn kryptisk (óskiljandi, uttan meining). "Hevði tað verið í Føroyum í dag, á dú, Fullveldið hevur skyldina". Tað er aldeilis ikki neyðugt at fara til Danmarkar og har velja negativ viðurskifti burturúr, og so servera tey, eins og var hetta lívið í Danmark. Dagin fyri viðmerkingina hjá varaløgmanni hevði Sosialurin tríggjar yvirskriftir á forsíðuni: *"Postverkið noytt at steingja", "Sjúkrabilurin steðgaði upp"* og *"Sosiala neyðin stór"*.

Man má undrast. Postverkið, sum varð yvirtikið sum føroyskt sermál fyri 25 árum síðan, koyrir við stórum halli. Sjúkrahúsverkið er niðurslitið, og tað er ikki fyrstu ferð at sjúkrabilar eru steðgaðir upp. Hvar fer blokkurin, sum upprunaliga fíggjaði eitt gott heilsuverk? Tað hevð verið bíligt at givið Heimastýrislógini skyldina

Men tað er sjálvandi tað hesin tjóðveldispropagandisturin ger. *"Men vit hava als ikki tikið ábyrgdina enn. (!!!!) Núverandi trupulleikar eru skaptir undir heimastýrinum. Teir kunnu bert loysast um vit taka ábyrgdina"*. Hatta er ov bíligt. Hatta er ikki trúverdugt. Hevur landsstýrið ikki ábyrgd??? Eigur landið ikki Postverkið??? Umsitur landsstýriðikki heilsuverkið??? og Sjúkrabilarnar??? Er sosiala neyðin tykkum óviðkomandi???

Støðan er hættislig - trúvirðið er farið

Eg má taka undir við blaðstjóranum Tøger Seidenfaden, sum í Politiken herfyri skrivaði *"Det færøske landsstyre kan ikke tages alvorligt"*. Hann viðger tey bæði samráðingarumførini, sum hava verið. Ella tak Jyllandsposten 4.5.00, sum kemur til somu niðurstøðu. Oddagreinin eitur *"Tvivlsom styrke"* og teir siga *"Spørgsmålet er, om det er muligt at nå frem til et resultat, som Landsstyret føler trang til at præsentere for de færøske vælgere. Svaret må blive benægtende"*. Hetta fara tjóðveldisfantastar sjálvandi at avvísa, tí danir eru býttir og vita eink um føroyskan politik, sum teir forhásuch plaga at taka til.

Hvussu ið víkir ella vendir, so eru danir og danska stjórnin annar parturin í samráðingunum, har landsstýrið millum annað roynir at fáa eina langa skiftistíð.

Men í løtuni hava vit eitt landsstýri við einum varaløgmanni á odda, og hann hevur spilt tað føroyska trúvirðið.

Varaløgmaður er veruliga ræðumyndin.

Rolf Guttesen
16.5.2000

Legurnar byrja aftur á Zarepta

Nú fara legurnar í Zarepta at byrja aftur. Byrjað verður 18. mai og síðani verða legur uttan slit út í oktober mánað.

Síðani fyrst í januar er stórt umvælingararbeiði farið fram har vesturi. Allur køkurin er gjørdur av nýggjum og lýkur nú øll nútímans krøv. Eisini er ymiskt annað umvælt, m.a. eru allar sengurnar í nýggjara húsinum gjørdar av nýggjum.

Lega fyri brekað

Fyrsta legan er sum vant legan fyri brekað. Hon byrjar hóskvøldið 18. mai og heldur fram til sunnudagin 21. mai. Hesar legur hava nú verið í nógv ár, og kann ikki annað sigast, enn at tær hava verið væl umtóktar. Hvørt árið hevur verið fullteknað, og ár eftir ár hava mong av teimum somu andlitunum verið at sað.

Skráin er rættiliga umfatandi. Har verða samrøður við avvarðandi, fyrilestrar, ítriv av ymiskum slag, ríðing, svimjing, spæl, nógvur sangur og annað.

Familjulegur

Í nógv ár hava eisini familjulegur verið á skránni í Zarepta. Fimm slíkar legur verða í ár. Tær fýra fyrstu verða frá 27. mai til 23. juni og hin fimta frá 20. til 26. august. Tær byrja leygardag og enda fríggjadag. Hesar legurnar, sum eisini altið eru fullteknaðar, eru ætlaðar foreldrum við børnum undir skúlaaldur. Tær eru eitt gott høvi hjá familjum at vera saman og hugna sær á ymiskan hátt. Skráin plagar at vera soleiðis, at fyrrapartarnar eru tveir bíblíutímar fyri foreldrunum, meðan onnur, ið eru komin vestur til tað sama, ansa eftir børnunum.

Seinnapartarnar er eingin føst skrá. Tá kunnu familjurnar gera sum tær vilja. Tíðin verður nýtt til gongutúrar, svimjing, spæl ella bert at vera saman og hugna sær.

Um kvøldarnar eru kvøldsetur og hugnaløtur.

Aðrar legur

Síðani verða legur alt summarið og út á heystið: Barna- og undómslegur, bíbliuskeið, lega fyri einlig, hjúnalegur, kvinnustevna og mansstevna.

Starvsfólk

Til alt hetta virksemið krevst sjálvandi eisini nógv starvsfólk. Brúk er fyri fólkið til køkin, matarhøllina, skrivstovuna, at vera náttarvaktir, leiðarar, vaskifólk o.s.fr. Alt hetta er sjálvboðið arbeiði.

Bardagi í Klaksvíksgøtum

Leygarmorgunin mátti løgreglan í Klaksvík kalla allar teir løgreglumenn inn, sum vóru heima, tí tað var handfast millum fleiri í Bøgøtu. Ikki fyrr enn um sjeytíðina var friður

Sveinur Tróndarson

Løgreglan í Klaksvík hevði úr at gera fríggjakvøldið. Fólk var í býnum, men lagið var eftir øllum at døma ikki so gott, tí tað gjørdist handfast fleiri staðni. Í Bøgøtu gjørdist heilt galið. Um fimmtíðina fekk løgreglan boð um, at fleiri menn vóru farnir upp at toppast og nú bardust teir í fleiri støðum. Vakthavandi í Klaksvík sigur, at sinnini kókaðu í Bøgøtu. - Allan vegin frá Atlantis og niðan til Lognbrá.var ein stórur bardagi, sigur vakthavandi á støðini í Klaksvík.

Fyri at fáa bukt við bardaganum mátti løgreglan kalla fólk inn. Bert fáir mans eru til arbeiðis um náttina, men tað eydnaðist at fáa fatur á seks løgreglumonnum, sum kundu fara á staðið at skilja sundur, men tað var eisini eitt stríð í sær sjálvum.

- Tað var ikki so ógvusligt. Onkur hevði fingið okkurt prus, men einki álvarsligt. Kortini var tað trupult at skilja sundur, tí teir bardust í fleiri støðum. Løgreglumenninir máttu mekla og skilja sundur onkustaðni, men tað gekk bara ein lítil løta, so var handfast aðrastaðni, sigur vakthavandi.

Men tað tók sína tíð. Av støðini í Klaksvík skilja vit, at tað var friður í Bøgøtu um sjeytíðina.

Skallaður í høvdi

Men tað byrjaði áðrenn. Um fýra tíðina, fekk løgreglan boð um, at tað var handfast millum tveir menn uttan fyri Lognbrá. Komnir hagar vísti tað seg, at tann eini var skallaður av hinum og mátti hann á sjúkrahúsi til kanningar.

Hin varð handtikin og skuldsettur fyri harðskap. Løtu seinni fekk løgreglan aftur fráboðan um ófrið. Nú var tað ein maður, sum dýrandi fullur og í øðini var farin í bilin, og farin til stroks. Tá tað ikki er loyvt at koyra ávirkaður, fór løgreglan eftir honum og handtók hann.

Hesin verður skuldsettur fyri at koyra ávirkaður. Úr Klaksvík skilja vit, at hetta hevur verið eitt av teimum ófriðarligastu vikuskiftunum í langa tíð.

16 ára gamal fekk nevan

Ein sekstan ára gamal unglingi fekk nevan undir vangan, í Steinatúni, frá einum, sum var á leið tvífalt so gamal

Sveinur Tróndarson

Góða veðrið um vikuskiftið fekk nógv fólk í býin í Havn. Kortini hevði løgreglan ikki stórvegis trupulleikar av teimum, tí so at siga alt gekk friðarliga fyri seg.

Koritni vóru onkrar smávegis hendingar. M. a. fekk ein 16 ára gamal unglingi nevan frá einum manni, sum var á leið tvífalt so gamal sum hann. Hvussu hetta var hent veit løgreglan ikki frá at siga, men unglingin meldaði tann eldra.

Eisini fekk løgreglan fráboðan um tvey smærri herverk á bilar. Onkur hevði langa eina buglu í ein bil, meðan onkur annar hevði brotið rútin á einum øðrum bili.

Sum vanligt hevur løgreglan eisini havt liggjandi gestir, men hetta vikuskiftið vóru teir ikki fleiri enn tríggir. Hinvegin, so koyrdu løgreglumenn fleiri til hús, sum, hóast gongulagið var vánaligt, vistu hvar tey búðu.

Engell nýggjur stjóri á Ekstra Blaðnum

Fyrrverandi danski løgmálaráðharrin og fyrrverandi formaður hjá teimum konservativu í Danmark, Hans Engell, er púra óvæntað, settur sum blaðstjóri á Ekstra Blaðnum. Hann gevst í politikki alt fyri eitt

Sveinur Tróndarson

Danska Ekstra Blaðið hevur fingið nýggjan blaðstjóra. Púra óvæntað eitur hann Hans Engell og av tí sama gevst Engell í donskum politikki í dag.

Tað var púra óvæntað, at Hans Engell, sum er fyrrverandi formaður hjá teimum konservativu í Danmark, og sum hevur verið ráðharri meiri enn einaferð, skuldi gerast blaðstjóri á Ekstra Blaðnum. Hóast tað hevur verið kent í eina tíð, at hann ikki stillar upp aftur til næsta væl, so kom hetta tó, sum ein bumba.

Fráfarandi stjórin á Ekstra Blaðnum, Sten Ove Gade, hevur í eina tíð sagt, at hann ætlar at leggja frá sær, og hetta ynski er nú gingið út. Gade er 64 ára gamal og hevur sitið í ovastu redaktónini síðani 1976.

Hans Engell, er útbúgvin journalistur, og segði, tá hann avdúkaði, at hann ikki stillar upp aftur til Fólkatingið, at hann ongar fastar ætlanir hevði fyri framtíðina. Hann var opin fyri hugskotum, og legði afturat, at ein journalistisk útbúgving kann hava so nógv við sær. Síðani tað hevur hann verið fastur viðmerkjari á dagblaðnum Børsen. Engell fær úr at gera á Ekstra Blaðnum. Upplagið hevur verið fallandi og tað fer at krevja sín mann, at fáa vent tí gongdini. Bæði fyrrapartsbløðini, Ekstra Blaðið og BT hava gjøgnum fleiri ár mist eina rúgvu av lesarum. Ekstra Blaðið er kortini tað, sum hevur fingið harðastu viðferðina, tí í fjør hevði blaðið bert 139.000 lesarar fyri alt árið. Hetta er tað lægsta nakrantíð.

Ferðsluóhappini økjast

Løgreglan í Havn hevur fingið fráboðan um átta smærri ferðsluóhapp síðani fríggjadagin. Tey flestu teirra henda, tí fólk tíma ikki at geva sær stundir tá tey koyra, sigur vakthavndi á støðini í Havn

Sveinur Tróndarson

Løgreglan í Havn hevur fingið fráboðan um átta smærri ferðsluóhapp síðani fríggjadagin. Tey flestu teirra henda, tí fólk tíma ikki at geva sær stundir tá tey koyra, sigur vakthavndi á støðini í Havn

Tað vóru átta ferðsluóhapp í Havn frá fríggjadegnum til sunnudagin. Tað sigur vakthavandi á støðini í Havn fyri Sosialinum.

Hann sigur, at tað henda fleiri og fleiri ferðsluóhapp, og at tey flestu teirra henda, tí fólk gevur sær ikki stundir at koyra bil. Og hansara meting er, at tað hongur saman við ferðini í samfelagnum sum heild.

- Tað er tíverri nakað, sum er uppi í tíðini, og fyri mær sær tað út til, at talið av ferðsluóhappum økist samstundis sum samfelagshjólini mæla skjótari og skjótari. Fólk geva sær ikki stundir at koyra bil, og tí koma tey í so nær einum øðrum bili, og so er galið, sigur vakthavandi á støðini í Havn.

Hann vísir á, at tað serliga eru smáir skaðar, sum eitt nú, at bilarnir koyra ov tætt upp at hvør øðrum og fremri bilurin bremsar. Alsamt fleiri fráboðanir koma eisini um at parkeraðir bilar eru árendir, og tað er tað, sum løgreglan kallar kleyvarskapur.

Ein orsøk til at smáu óhappini økjast kann vera, at fólk sita og tosa í fartelefon meðan tey koyra bil, men tað verður ikki so leingi afturat, tí við broytingunum í nýggju ferðslulógini verður hetta forboðið.

- Eg legði tað eitt nú til merkis ein dagin í R. C: Effersøesgøtu. Tað komu fimm bilar um hornið, og farararnir sótu allir sum ein og tosaðu í fartelefon. Onkur teirra meira lá enn sat, og tað hevur sína á virkan á koyringina, eingin ivi um tað.

Men, sum sagt, verður hetta bara loyvt til broytingarnar í ferðslulógini verða lýstar. Broytingarnar, sum vóru samtyktar í løgtinginum 4. mai siga nevniliga, at tað framyvir verður ólógligt at tosa í hondhildnari fartelefon, samstundis sum tú koyrir bil. Aktar tú ikki boðini fært tú bót.

Royndir í Musikkskúlaskipanini komandi heyst

Royndir í skrivligari teori, ljóðførisspæli og sangi verða í november 2000 í Føroyum. Næmingar tekna seg sjálvbodnir, og stoðutakan eigur at verða tikin í samráð við lærara fyri summarsteðgin, so at tíð er til nótakeyp og fyrireiking.

Prógvdómari frá enska metingarstovninum Associated Board of the Royal Schools of Music í London, kemur higar. Føroyskur tulkur er til royndirnar.

Endamál
- Royndirnar geva næmingum møguleika at seta sær ávegis mál, og at fáa eina meting eftir altjóða støði.
- Prógv verður givið, tá ið royndin er staðin. Minsta krav er 100 av 150 møguligum stigum.

Royndirnar
Preparatory Test er ein fyrireikandi royndi fyri byrjarar. Skrivligt ummæli verður givið beinanvegin.

Performance Assessment er fyri øll eldri enn 21 ár, bæði byrjarar og yrkisleikarar, sum ynskja eitt óheft og professionelt skrivligt ummæli beinanvegin, og eina samroðu við prógvdómaran.

Stig 1, 2, 3, 4 og 5 royndirnar eru skipaðar soleiðis:
- Næmingurin spælir trý sjálvvald stykkir av ABRSM lista, ið hann hevur lært seg frammanundan.
- Næmingurin spælir teir tónastigar (skalair) og tríljómar (arpeggios), sum standa í ABRSM skránni.
- Næmingurin spælir eitt stutt stykki, sum hann ikki hevur sað frammanundan.
- Næmingurin verður biðin at klappa antin pulsin ella melodi-rútmuna meðan prógvdómarin spælir á klaver.

Næmingurin skal siga um stykkið gongur í tveimum, trimum ella í fýra sløgum í taktini.

- Prógvdómarin spælir ein stuttan setning fyri næminginum tvær ferðir. Næmingurin verður biðin at syngja ella murra tað sama beint eftir at dómarin er liðugur.
- Á hægru stigunum verður næmingurin biðin at syngja nakrar tónar eftir nótum. Prógvdómarin spælir fyrstatónan og spælir eisini rætta tónan, um næmingurin fer skeivur.

Royndirnar vara umleið 12 - 16 minuttir. Fyri at sleppa til royndina í ljóðføri ella í sangi í 6., 7., og 8. stigi, skal næmingurin hava staðið skrivligu teoriroyndina 5. stigi.

Prógvtøkugjøld

Í ljóðførisspæli ella sangi		Í skrivligari teori	
Preparatory Test	Kr 250,-		
Stig 1	Kr 310,-	Stig 1	Kr 175,-
Stig 2	Kr 350,-	Stig 2	Kr 175,-
Stig 3	Kr 350,-	Stig 3	Kr 175,-
Stig 4	Kr 410,-	Stig 4	Kr 230,-
Stig 5	Kr 410,-	Stig 5	Kr 230,-
Stig 6	Kr 480,-	Stig 6	Kr 300,-
Stig 7	Kr 560,-	Stig 7	Kr 300,-
Stig 8	Kr 620,-	STig 8	Kr 300,-
Performance Assessment	Kr 410,-		
Advanced Certificate	Kr 1100,-		

Tilmelding í seinasta lagi 21.september 2000.

Meira fæst at vita hjá Musikkskúlaskipanini
Hoyvíksvegur 72 FO 100 Tórshavn tlf 316462 fax 316991
ella musikkskúlastjóranum Martin Mouritsen tlf 216462
t-postur: martin@umms.fo

MUSIKKSKÚLASKIPANIN